Viðmerkingar til uppskot til løgtingslóg um broyting í barsilsskipanina

- Yngri Læknar Føroyar viðmæla Føroya Løgting at samtykkja lógaruppskotið.

Vit eru fegin um, at Landsstýrið hevur sett sær fyri at endurskoða barsilsskipanina. Hámarksútgjaldið úr barsilsgrunninum er ikki endurskoðað í nógv ár, men lønirnar eru hækkaðir munandi hesi árini. Tað viðførur, at ein vaksandi partur av arbeiðsfjøldini fáa lønarmiss av at fara á barnsburðarfarloyvi.

Vit meta, at útgjøldini úr barsilsgrunninum skula fylgja lønarviðurskiftini og inflatiónini. Barsilsgrunnurin verður fíggjaður við einum prosentgjaldið av lønarinntøkunum hjá arbeiðsfjøldini, og tað eigur tí at vera haldbart at leypandi hækka hámarksútgjaldið. Hetta er tí, at tá lønarinntøkurnar vaksa, so veksa inngjøldini til barsilsgrunnin samsvarandi, og tað eigur at koma arbeiðstakarinum til ágóðar.

- *Yngri Læknar Føroyar*